


*Boringin á Glyvursnesi kann fáa stóran týdning fyri leitingina á landgrunninum komandi árini. Stórur partur av landgrunninum er fjaldur av basalti. Fyri 9 ára loyvini og fyri komandi útbjóðingar hevur tað altavgerandi betri at skilja basaltið og fáa betrað um seismisku kanningarháttirnar og tulkingarnar. Higartil eru boraðir 3 brunnar á føroyskum øki. Eftir eru 5 brunnar á bora. Agip skal bora tann fjórða næsta ár. Hinumegin markið skulu 8 brunnar borast næstu árini. 1. Phillips fer møguliga at bora í 2004. 2. Amerada Hess hevur júst borað ein brunn og fer helst at bora hin (Bedlington) í 2004 ella seinni. 3. Texaco skal bora tveir brunnar, tann fyrra næsta summar. 4. BP boraði (Assynt) í fjør men skal bora tveir aftrat. Óvist nær. 5. Amerada Hess borar Cambobrunnin í løtuni. 6. Texaco ein brunn. Óvist nær hann verður boraður*

*Framhald av síðu 13*

Felagið hevur drúgvar royndir við kjarnuboringum í hørðum jarðgrýti í samband við námsvinnu og forkanningum fyri goymslu av geislavirknum burturkasti í Finnlandi og Svøríki. Henda boringin verður væntandi liðug til jóla.

Endamálið við sjálvari boringini er at fáa nýggja vitan um teir fysisku eginleikarnar í basalti, tvs. hvussu tað kann transmitera seismiskar bylgjur. Basalt er nevniliga ikki homogent tvs. eins allan vegin. Onkunstaðni er tað sera massivt og fínkornað, aðrastaðni er tað poknut. Tað veldst eisini um innskot og forskjótingar í jarðløgunum. Trupulleikin við basalti í dag er tann, at tað er sera torført við vanligum seismiskum bylgjum at gera sær eina mynd av, hvussu tað sær út undir basaltinum. Fyri at kunna fáa neyvari og betri seismiskar kanningar gjørdar og harvið meira álítandi úrslit er neyðugt at skilja basalti betur.

Talan er um rættiliga einastandandi kanningar, sum ikki eru gjørdar áður í sama mun. Nakað er borað í sambandi við stóra "Ocean Drilling Programm", har tað m.a. eru gjørdar kanningar og boring á Vøring háslættanum út fyri Miðnoreg. Men sum skilst er hetta fyrsta kanning í heimshøpi av sínum slag og tí verður hon eisini eygleidd við sera stórum áhuga í oljuheiminum. Nógva aðrastaðni í heiminum, har leitað verður eftir olju, eru somu trupulleikar við basalti.

Nú verða so sjálvar borikjarnurnar kannaðar, og eftir tað verða gjørdar fysiskar kanningar niðri í sjálvum boriholinum.

Sindri bólkurin, sum fíggjar kanningarnar, er myndaður av teimum oljufeløgum, sum hava leitiloyvi á føroyskum øki. Aðalmálið er at seta í verk jarðfrøðiligar kanningar, sum kunnu fáa týdning fyri framtíðar kolvetniskanningar, sum liggja uttan fyri tað núverandi loyvissøkið. Luttakandi feløgini í Sindri eru: Agip, Amerada Hess, Statoil, BP, DONG, Atlantic Petroleum, Phillips, Shell, Anadarko, Petro Canada, Føroya Kolvetni og British Gas.

Jarðfrøðissavnið er eisini umboðað í Sindri stýrisbólkinum. Atlanticon er umsitingardepil hjá Sindri.


*Eyðun Elttør, fylgir boringini á Glyvursnesi við stórum áhuga. Hon kann verða ein lykilin til betri at skilja basaltið og harvið lættari at kunna "síggja" oljukeldur undir føroyska basaltinum*

*Mynd Álvur Haraldsen*




# Bilar

Nr. 204 • hósdagur • 24. oktober 2002 • 76. árg.

# Bilfríðkan bjóðar øllum at royndarkoyra ein Fiat Stilo



*Suni Magnussen, sølumaður hjá Bilfríðkan, bjóðar øllum at koma og royna ta nýggju Fiat generatiónina við at royndarkoyra ein Stilo, sum er ein bilur í gjøgnumførdum kvaliteti. Hesin bilurin er skrásettur og prýddur til tað sama*

**Eins og hjá øðrum Fiat bilasølum, eitt nú í Damnark, ber nú eisini til hjá fólki í Føroyum at royndarkoyra ein væl útgjørdan Fiat Stilo, í ein dag ella eitt vikuskifti, uttan at gjalda fyri tað ella binda seg til nakað sum helst**

BILASØLA
*Magnus Gunnarsson*

Fiat Stilo kom á marknaðin fyrst í árinum. Bilurin, ið avloysir Fiat Bravo og Brava, verður gjørdur í tveimum úgávum, sum ikki líkjast heilt. Tað at Italska Fiat verksmiðjan hevur gjørt nógv burturúr kvalitetinum á Stilo, hevur givið bilinum góða umtalu í útlendskum bløðum. Fyri at geva fólki møguleika at royna bilin hava teir hjá Bilfríðkan skrásett ein nýggjan Fiat Stilo, sum øll hava møguleika at roydarkoyra uttan at binda seg til at nakað sum helst. Hetta er ein roynd at marknaðarføra nýggju Fiat generatiónina í Føroyum. Hetta er roynt aðrastaðni, eitt nú í Danmark, har teir hava góðar royndir av tiltakinum.

Bilurin er ein væl útgjørdur Stilo Dynamic við 5 hurðum og 1,6 ltur 16V motori. Hann hevur t.d. elektriska servostýring við City-funktión, har man við at trýsta á ein knøtt á instrumentborðinum kann broyta stýrieginleikarnar, soleiðis at bilurin verður heilt lættur at stýra. Hetta er væl egnað til býkoyring, við tað at bilurin verður lættari at parkera har sum tað er trongt og lítið pláss. Annars hevur bilurin fjarstýrt sentrallás, elektronisk lás í baklúkuni, anti-spinn, cruise control og aircondition. Eisini kunnu forsetrini stillast allar vegir, eins og baksetrið kann flytast aftur og fram, og baksmekkan kann stillast á sama hátt sum vanligt er við forsetrunum. Bilurin fæst við trimum bensinmotorum frá103 til 170 hk og tveimum 1,9 JTD dieselmotorum við ávikavist 80 og 115 hk.

# Tíðindaskrivið Ellisakfør er nú at fáa á Shellstøðunum

**Í blaðnum hesaferð eru fleiri áhugaverdar greinar. Sum t.d. um hvussu svimjiviðurskiftini vóru í Havnini í 40-unum, um vakrasta ellisakfarið í Varmakeldu og um fleiri útlendskar vitjanir ið vóru í summar**



*Á forsíðuni er formaðurin í Føroya Ellisakførum, Ingi Justinussen, við síni Harley Davidson frá 1962*

ELLISAKFØR
*Magnus Gunnarsson*

Tað stuttliga við áhuganum fyri gomlum akførum, er at tað er sera ymiskt, sum áhugin er fyri teimum ymisku akførunum. Onkrum dámar serliga væl bilar ella motorsúkklur frá einum ávísum tíðarskeiði. Sum oftast stavar áhugin frá tí, ein kann minnast frá barnaárunum. Sum til dømis hjá Leivur Torvadal í Havn, ið samlar uppá gamlar knallertir. Sum smádrongur gekk hann sum húsfólk á súkkluverkstaðnum hjá André Andrésen. Tað er allarhelst her, at áhugin fyri gomlu knallertunum er vaktur. Leivur liggur altíð framvið, tá onkur gomul knallert verður koyrd á brennistøðina á Hjalla. Higartil hevur hann fingið fýra knallertir, harav tær tvær hevur hann fingið á brennistøðini. Eina Puch Maxi og eina Kreidler Florett LF, ið báðar eru frá 1972, hevur hann fingið á brennistøðini. Síðan hevur hann eina Puch Monza frá 1984, ið hann sjálvur hevur havt síðan 1989. Eisini hevur hann eina Tempo Corvette frá 1985.

Hesa knallertina hevur Leivur arvað eftir abba sín, Helge Harboe Ree, sum búði í Lillehammer í Norra. Helge búði í Føroyum frá 1943 til 1951. Tey sum eiga gamlar knallertir, ið tey vilja sleppa av við, kunnu kontakta Leivur Torvadal, áðrenn tey koyra tær burtur. Hann hevur telefon 320325.


*Í Tíðindaskrivinum Ellisakfør hesaferð kunnu vit lesa um Leivur Torvadal, ið samlar uppá gamlar knallertir. Hesa Kreidler Florett LF, sum hann situr á, fekk hann herfyri á brennistøðini á Hjalla. Hon var í fínasta standi*